**Skrivligur fyrispurningur**
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

**Evni:** Hjálparpakki og neyðarróp frá ferðavinnuni

**Spurningar:**

1. Kemur ein hjálparpakki til ferðavinnuna, so stórir partar av vinnuni, vitanin og arbeiðspláss í hesi vinnu ikki fara fyri skeytið?
2. Um ja, nær væntar landsstýrismaðurin at koma við hjálparpakka, og hvussu fer hesin at síggja út?
3. Hvørjar avleiðingar kann tað fáa fyri búskapin, fyri ferðavinnuna og í mun til arbeiðspláss har, eisini í longdini, fær vinnan ikki eina hjálpandi hond?
4. Nær fer landsstýrismaðurin at taka eina avgerð um hetta?

**Viðmerkingar:**
Búskaparráðið mælir í várfrágreiðing síni til at "hjálparpakki verður veittur ferðavinnuni, so vinnan og vitanin í ferðavinnuni ikki fara fyri skeytið".

Júst hetta hava vit áhaldandi víst á. Tí ferðavinnan klárar ikki enn eitt summar í lægsta geari, og lítið bendir á, at henda vinna aftur kann virka eftir vanligum treytum, fyrr enn komið er út í 2022.

Í svari upp á fyrispurning nr. 52-40/2020 segði landsstýrismaðurin, at hann fylgdi støðuni, men at "tað er ikki gjørd nøkur ítøkilig ætlan um at hjálpa ferðavinnuni, men tað verða áhaldandi gjørdar metingar av, hvørt neyðugt er við tiltøkum." Somuleiðis vísti hann á, " ... at umsetningurin í ferðavinnuni er fallin munandi samanborið við 2019, hjá ferðaskrivstovunum uml. 90%, hjá gistingarhúsunum millum 60 og 80%, matstovur uml. 40-50%, bussfeløg uml. 85 -95 %, upplivingar uml. 60% og bilútleigarar uml. 95%.", sambært upplýsingum frá Ferðavinnufelagnum.

Í gjár segði landssýrismaðurin so, at ein hjálparpakki er klárur, men sum skilst ivast landsstýrið í, hvørt tað verður neyðugt at seta hann í verk. Samstundis segði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, at tað ikki er teirra uppgáva at oysa pengar út til vinnuna.
Spurningarnir verða settir, tí tað stendur rættiliga ógreitt, hvørt landstýrið hevur ætlanir um at hjálpa ferðavinnuni, ella ikki.

**Á Løgtingi, 19. mars 2021**

Bjørt Samuelsen